# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Amon Djurhuus á Glyvrum** andaðist mánadagin 27. aug 80 ára gamal. Kistan fer av Røktarheiminum í Glyvra Kirkju mikudagin kl. 17.00 Jarðarferin verður úr Glyvra Kirkju hósdagin kl. 13.00´ Tey í vilja minnast Amon kunna senda eina peningagávu á konto í Eik

**Arnhold Jespersen, Trongisvági**, andaðist í heiminum mánadagin 27. august, 93 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Theanu Follend** kemur í Vestmanna kirkju í kvøld klokkan 19. Jarðarferin verður mikudagin klokkan 14.

✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Amon Djurhuus**
Glyvrar

andaðist á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimið mánadagin 27. aug 80 ára gamal.
Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík mikudagin 29. aug kl. 17.00
Jarðarferðin verður úr Glyvra Kirkju hósdagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Kona, børn, svigarbørn, abba- og langabbabørn**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu í stóru sorg okkara, tá høgt elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og sonur okkara

**Hans Jacob Sigvardsen**
lærari, Argir

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til Sverra Steinhólm og Hans Jacob Joensen fyri góð og troystarrík orð til jarðarferðina.
Stóra tøkk øll tit, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk fyri vitjanir, uppringingar, blómur, kransar og peningagávur til kirkjurnar við Gjógv og á Argjum.
Stóra tøkk fyri vøkur minningarorð í bløðunum.
Tøkk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Familjunnar vegna*
**Rigmor,**
**Karl Erik, Inna, Rói við familjum og Karl Jacob**

# Hansina Joensen Toftir 90 ár

## Kvøða til móður okkara á níti ára degnum



*Líradagur er hann nevndur,*
*árið nítjan seytjan er.*
*Skálafjørður allur fevndur*
*fjøllum av, her vakurt er.*

*Bygdin armar sínar breiðir,*
*sólin stavar himni frá.*
*Nýslignir nú liggja teigar,*
*Oyran breið við baldursbrá.*

*Framvið sandurin so langur*
*sum ein bordi – prýðir teg.*
*Alt av summarlýðku angar,*
*løkurin sær trilvar veg.*

*Onki stóð í stjørnum skrivað,*
*- um tað undur, hent nú var -*
*Fødd var genta, kom at liva*
*hesi náttúru so nær.*

*Vaks so upp í tryggum heimi,*
*friður fylti hvørja lund.*
*Hildu tykkum rætt at gleimi*
*styttu so um manga stund.*

*Várið kom, og menn teir fóru*
*Suðurland var teirra mál.*
*Børn og eldri eftir vóru,*
*arbeiddu øll sum ein sál.*

*Sildin skuldi hvønn dag førast*
*Stórhús í við árabát.*
*Lotið undan tók at rørast,*
*settu segl og sigldu kát.*

*Saltfiskin tit eisin´ greiddu*
*vaskaður á Stóraskerð.*
*Á Oyruna tit út hann breiddu,*
*slíkur dagur strævin er.*

*Øksnagjógv við Typpafossi*
*- hesi støð ei lógu fjar -*
*Valla nevnt varð hetta plássið,*
*áður torv í huga var.*

*Vit ei mega gloyma hoyggið,*
*Stórateigi nógv var á.*
*Tit av sonnum fingu toyggið,*
*nulvast hvør ein teigur má.*

*Skúlatíðin var hin besta,*
*tá tú livdi mitt í verð.*

*Nærløgd og í huga festi,*
*alt sum lærast kundi her.*

*Mangt eitt vetrarkvøld varð bundið*
*vøttir, hosur, annað við.*
*"Upp á gólv" viðhvørt tit mundu*
*treða dansin lið um lið.*

*Tíðliga legði tú frá landi,*
*út at tæna leiðin bar.*
*Arbeitt varð í góðum anda,*
*álítandi altíð var.*

*Í Kirkjubø var gott at vera,*
*hetta heim tú gloymdi ei.*
*Bønirnar her mundu bera*
*signing yvir tína leið.*

*Toftabygd vit nevna vilja*
*- her tú tænti Regni á -*
*Hvør sum vil, hann man tað skilja,*
*avgjørd lagna tín varð tá.*

*Her tú møtti sveini unga,*
*knýttu tit her ástarbond.*
*Festu seinni búgv á Dunga*
*ríkt vælsignað av Guds hond.*

*Børnini – fjølment í tali*
*spreiddu gleði, lív um seg.*
*Knoss tað var tey at uppala,*
*ongantíð tú spardi teg.*

*Hendurnar tú góðar hevur,*
*mangt eitt plaggi virkað her.*
*Onga mynsturbók tú krevur,*
*alt í høvdinum jú er.*

*Men í lívsins skúla harða*
*sjúka gjørdi nógv um seg,*
*millum tey tú av manst varða,*
*torført var at greiða veg.*

*Nøgdsemi er dýrur farmur,*
*takklæti av øllum ber.*
*Innanfyri hesar karmar*
*trygt tú livir lív títt her.*

*Gávumild tú ert av lyndi,*
*gevur har ið treingir til.*
*Vinstra hond hon má sær linda,*
*hvat ið høgra geva vil.*

*Mál tú sett tær fyri hevur,*
*vilji tín útinna má.*
*Nógv tú av tær sjálvum krevur,*
*alt skal vera snøgt at sjá.*

*Um tign og mynduleika tosar*
*vakri høvuðburður tín.*
*Vakrast ert tú, tá tú brosar,*
*eygu tíni bjørt sum vín.*

*Trúgvin man tær uppihalda*
*hvønn ein dag, ja hvørja stund.*
*Á tann Gud sum øllum valdar,*
*javnt tú leitar á hans fund.*

*Tú til hann oss lærdi venda*
*hug og sál í bøn til hann.*
*So vit øll í himli lenda,*
*móðirbøn Gud hoyra man.*

*Nú í dag tú níti rundar*
*- hábærslig sum altíð er -*
*Og tað móti kvøldi stundar,*
*vilja vit teg heiðra her.*

*Takka vilja vit øll fyri*
*stuðul, vegleiðing og ráð.*
*At vit kundu leggja byrði*
*vára – tínar herðar á.*

*Vit nú kvøðu okkar´ enda,*
*ynskir hvør av hjarta blítt.*
*So Gud framvegis má senda*
*signing yvir lívskvøld títt.*

**Ynskja børnini**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 80 ára føðingardegi mínum 19. juni, takki eg hjartaliga.

**Bestu heilsanir**
**Ragnhild Hansen**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

**Dagurin**
**29. august. Jóhannes hálshøgdur.** Dagurin hildin til minnis um at Heródes læt Jóhannes Doyparan hálshøgga. Samveldissáttmáli varð gjørdur í Bergen millum Noreg og Danmark hendan dagin í 1450.

Sosialurin -har tað hendir